# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## VITIN lýsir á sangferð í Danmark

**Í døgunum 22. til 30. juli fer sangbólkurin VITIN á sangferð í Danmark**



### SANGUR

Bólkurin er kendur fyri at skipa fyri evangeliskum sangløtum í Ítróttarhallum, og hevur vitjað og sungið í flest øllum bygdum og støðum í Føroyum.

Fríggja-, leygar- og sunnukvøldið 22., 23. og 24. juli – øll kvøldini kl 19.30 – luttekur VITIN á kristiligum fundum, ið verða hildnir í matstovuni á nótaverkstaðnum Cosmos Trawl í Hirtshals.

Hesir fundir hava verið hildnir á hesum stað á hvørjum ári nú í mong ár, og er tað samkoman MALTA í Hirtshals og Levi Joensen, ið skipa fyri.

Ólavsøkuaftan, hóskvøldið 28. juli klokkan 19.00 syngur bólkurin á Norðuratlantsbryggjuni í Keypmannahavn í samband við Ólavsøkuna, sum verður hildin har. Fríggjakvøldið 29. juli kl 20.00 verður sungið í Kristnastovu.

Tiltøkini í Keypmannahavn eru í samstarvi við Kristnastovu og Øssur Berghamar, sum hevur virkað millum føroyingar í Keypmannahavn í mong ár. VITIN syngur gamlar og yngri sálmar, og sangir ílætnar ein lættan nútímans búna.

Flestu kvartettsangirnir, bólkurin syngur, eru gjørdir í samstarvi millum Levi Joensen, ið hevur yrkt, og Torkil Mørkøre, sum hevur smíðað løgini.

Endamálsgreinin hjá bólkinum er at vera eitt ljós fyri síni medmenniskju og vísa teimun á Kristi fullgjørda verk á krossinum, sum er øllum til frelsu sum trúgva.

## Alheims skótalega í Noregi

**1975:** 30. juli hetta árið varð stóra alheims skótalegan – jamboree'in - í Lillehammar sett í fagrasta summarveðri. Aftaná lutakast millum teir 17.000 skótarnar úr 93 londum varð hin 16 ára gamli havnardrongurin, Hans Dalsgaard, valdur at tendra jamboree-eldin. Hesin siðurin hev-ur verið hildin líka síðani 1920, tá hesar stóru skótalegurnar byrjaðu. 75 føroyskir skótar luttóku á stevnuni, har m.a. Ólavur kongur av Noregi var hjástaddur undir hátíðarhaldinum.

*Kelda: Myndaárbókin 1975*



## Tyrla við sjúkum manni

**Tað tók bjargingartyrluni einans seks minuttir at fáa ein sjúkan sjómann úr Russlandi umborð, og síðani flyta hann á Landssjúkrahúsið til viðgerð**

### Sjúkraflutningur

**Bjarging:** Týsmorgunin fekk Sjóbjargingarstøðin boð um at ein maður umborð á einum russiskum skipi var vorðin sjúkur.

Klokkan var 7:35 tá Skipafelagið Føroyar sendi boð til støðina um ein sjúkan mann umborð á »Pyotr Shafranov«. Sagt varð, at maðurin var illa fyri.

Skipið var tá statt 267 fjórðingar í ein landnyrðing úr Fugloynni. Neyðugt varð hjá skipinum at sigla nærri landi, og at koma inn um 200 fjórðinga sjómark okkara.

Kl. 14:45 var tyrlan »Rescue SR« á flogi, og kl. 16:19 var tyrlan yvir skipinum, sum tá var statt 127 fjórðingar úr landi.

Einans seks minuttir seinni – kl. 16:25 – var tyrlan á veg innaftur og lendi við Landssjúkrahúsið kl. 18:11.

Síðani kom russiski sjómaðurin undir læknahond.

**Dagurin 21. juli**

**Evenus.** Grikska navnið Evenus er ikki at finna í halgimannatali, men er onkursvegna komið upp í álmanakkarnar frá 1727.

## Andlát og jarðarferðir

**Ninna Eliassen, Fuglafjørður,** andaðist á Vesturstovu í Fuglafirði týsdagin 19. juli, 80 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Fuglafjarðar kirkju leygardagin klokkan 14.

Tey, sum vilja minnast Ninnu, kunnu lata Vesturstovu eina gávu. Konto í peningastovnunum.

**Egil Djurhuus, ættaður úr Kollafirði, búsitandi í Havn,** andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin 18. juli, 75 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju fríggjadagin klokkan 14.

**Svend Julian Næs, ættaður úr Nesi í Hvalba,** andaðist á sjúkrahúsinum í Hillerød 15. juli, 73 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Lynge kirkju í dag, hósdagin klokkan 13.

Tey, sum vilja minnast Julian, kunnu lata Hvalbiar kirkju eina peningagávu.

**Kistan við Oskar Thomsen, Nólsoy,** fór út til Nólsoyar við Rituni í gjárkvøldið, mikukvøldið klokkan 18.00. Jarðarferðin verður í dag, hósdagin klokkan 13.00 úr Nólsoyar kirkju. Í sambandi við jarðarferðina, siglir Ritan eykatúr av Bursatanga hósdagin klokkan 12.

**Símin Rasmussen, vanliga nevndur Símin uppi í Gerði, Strendur,** andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin 17. juli, 72 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Sjóvar kirkju í dag, hósdagin klokkan 14.

*Kelda: Kringvarp Føroya*

**80 ár**
Hósdagin 21. juli fyllir Anna Margretha Johannesen, Vestmanna, 80 ár. Føðingardagurin verður hildin í miðhøllini í Vestmanna skúla, har øll eru hjartaliga vælkomin eftir kl. 19.00.

Hósdagin 21. juli verður Ella Eliasen, Fuglafjørður, 80 ár.

**95 ár**
Hósdagin 21. juli fyllir Mona Isaksen, í Garðinum 10 í Klaksvík, 95 ár.

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður, pápi, verpápi, abbi, beiggi og svágur okkara

**Egil Djurhuus**

ættaður úr Kollafirði, búsitandi í Havn

andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin 18. juli, 75 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju fríggjadagin kl. 14.

*Vegna familjuna*
**Maria
og Tróndur við familju**